

## Tónleikur

# Mentanarnátt í Margarinfabrikkini

**Margarinfabrikkin var fríggjakvøldið, í samband við Mentanarnáttina, karmur um konsert við fleiri nýggjum sum eldri havnabólkum. Líggjas Olsen greiðir her eitt sindur frá um tiltakið og framførslurnar**

Líggjas Olsen
*liggjas@gmail.com*

Margarinfabrikkin hevur í nógv ár virkað sum ein pallur fyri ungar bólkar, har fleiri av teimum eisini venja uppi á gomlu fabrikkini. Í hølunum, har dagstovnur dagliga verður rikin, er pallur og ljóðanlegg, so møguleiki er fyri at spæla tónleik. Har er hugnaligt, við dekorativum málningum á vegginum og sofum at blaka seg á, og pláss er fyri nokso fitt av fólki.

Tað er tørfort tó at fáa tað at ljóða gott. Tað verður skjótt hart og skurrandi fyri oyruni, og fríggjakvøldið var einki undantak. Ljóðið var tó ikki beinleiðis vánaligt. Fríði við pultin gjørdi sítt besta, men tá harðast leikaði á, var tað altso nakað hart og ókontrollerað. Serliga um tú vart tætt upp at pallinum, var góður møguleiki fyri at fáa hoyriskaða, um tú ikki hevði stappað oyraproppar í oyrini, sum onkur hevði gjørt. Annars var konsertin vælvitjað. Tað virkaði, sum komu fleiri og fleiri fólk inn allatíðina, og eina løtu var rættiliga stappað harinni við ungum sum eldri áhoyrarum.

### Góð intuitión

The Story Ends vóru fyrstir á pallin. Havi hoyrt hendan bólkin nakrar ferðir nú eftirhondini, og havi sum oftast dámað væl tað, teir gera. Fríggjakvøldið skuffaðu teir ikki. Teir eru enn líka frískir og stuttligir á pallinum, sum teir altíð hava verið, og nú við eyka limi í bólkinum, bassleikaranum Sakaris Joensen, sum má sigast at passa væl inn í bólkin við sínum kontanta bass spæli.

Við nýggjum bassleikara og einum væluppløgdum Filip Mortensen á odda, syrgdu teir fyri, at fólkini í Margarinfabrikkini komu til sín rætt. Haldi, at bólkurin veruliga hevur fatur á onkrum við sínum lætta, ómakaleysa úttrykki. Bass og trummur koyra væl saman, og legg so Hanus Mikael Andreasen á gittar og eyðkendu røddina hjá Filip Mortensen afturat, so hevur tú eina eind, sum letur spontanitet, einføld, tættsitandi riffs og einfaldar melodilinjur koma upp í eina hægri eind. Eg hevði hoyrt bólkin nakrar vikur frammanundan á sama staði, og tá haltaði eitt sindur við samanspælinum, men hesaferð gekk nógv betur. Sakaris er komin til sín rætt og tað ljóðar kul. Serliga lagið »Good Intuition« sat væl, og tað var sum heild ein góð og frísk framførsla frá TSE. Eg vóni, at teir skjótt fara at smíða nøkur løg afturat og geva eina fløgu út. Havi hoyrt mestsum somu løgini frá teimum rættiliga leingi, so tað hevði verið gott við nýggjum løgum og at hoyrt hvussu bólkurin roynist í studio.

### Blues og grýtur

Aftaná ein lítlan steðg kom tað besta, mundi eg sagt. Bluesarin Uni Debess. Við sær hevði hann



*Synarchy vóru millum bólkarnar, sum framførdu í Margarinfabrikkini á Mentanarnáttini. Teir høvdu eina harða og orkufulla framførslu, sigur ummælarin Líggjas Olsen.*
*Mynd: Eyðun Muller*

Brand Jacobsen og Búa Dam, sum beint frammanundan heilt spontant hevði játtað at koma uppá pallin at jamma við. Hetta varð ein góð avgerð, tí tað riggaði sera væl. Búi spældi uppá tammir og eina snartrummu, meðan Brandur hevði funnið eitt serligt trummusett við flosum, grýtum, ristum og øðrum stuttligum tingum at sláa á (Helt meg hoyra Fríða siga, at tað vóru hann og Guðrið Hansdóttir, ið høvdu skrúvað tey saman). Sum Uni tók til: »Trummuspælarar verða sum børn, tá teir finna okkurt nýtt at spæla sær við«. Tað var feitt at hoyra Brand finna útav hesum settinum, sum hann ikki hevði spælt á áður, meðan Uni koyrdi við sínum eyðkenda bluesstíli, ið hann eftirhondini má sigast at meistra sera væl. M. a. spældi bólkurin »Before You Accuse Me« hjá Eric Clapton, og her kom ein longri jamsession uppí, sum var kul, serliga tí Brandur, við nýggja trummusettinum, og Búi vóru í sínum rætta elementi. Tað osaði satt at siga av góðum spæli og stemningi. Ein sera góð framførsla frá teimum trimum, og kanska teir áttu at umhugsa fleiri av hesum slag.

### A55

Triðja framførslan hetta kvøld var ein ungur bólkur, ið kallaði seg A55. Dreingirnir í bólkinum eru ikki meir enn 12-13 ára gamlir, burtursæð frá eitt sindur eldra trummuspælaranum, sum avloysti ein annan, skilti eg á lagnum. Teir spældu tøkuløg av m.a. Green Day og Guns 'n Roses.

Bert tríggir mans eru í bólkinum, sangarin spælir eisini bass, og so eru el gittari og trummur afturat. Samanspælið var, sum tað nú einaferð er, tá man byrjar at spæla rokktónleik í hasum aldrinum, men tó so; fínasta slag til at vera so óroyndir og ungir. Sangarin var deiliga karismatiskur og hevði eina kula attitudu, og røddin var góð. Gittarleikarin slapp at spæla nakrar solo'ir, og hetta gjørdi hann við lív og sál. Hann sá heilt kul út haruppi, og kanska var eg vitni til ein framtíðar Terja Skibenæs (Týr) her. Um hann venur nógv, væl at merkja.

Stuttligt var at síggja og hoyra hesar ungu menninar spæla, og tað helt áhoyrarafjøldin eisini, sum tóktist at elska tað. So nú vóni eg, at teir skjótt fara at taka tað stigið víðari og gera egin løg og venja nógv.

### Abort og vælferð

Jákup á Lakjuni kallaðist næsti ungi maðurin, sum spældi gittar og sang. Hesin spældi egin løg, sum hann hevur skrúvað saman heima í kamarinum hjá sær sjálvum. Hann viðgjørdi tey heilt stóru evnini so sum abort og vælferð í annars einfaldu sangunum hjá sær, ið ikki ordiliga ríndu við hjá mær. Mær dámdi best tað fyrsta lagið, har hann imiteraði eina trompet í byrjanini. Tað var frískt og stuttligt. Restin hevði ikki so nógv uppá seg. Eg saknaði sterkari melodiir og áhugaverdari útsetingar. Hann sang tó, sum um hann meinti tað, og kudos fyri tí.

### Nakað hart

Næsti bólkurin var aftur ein ungur tannáringabólkur, ið mest spældi tøkuløg. Bólkurin byrjaði við 90'ara hittinum »Freak« hjá Silverchair, og tað er ræðuligt, tað var hart frá ta løtuna! So hart, at eg rýmdi út at hvíla oyruni.

Metalbólkurin Synarchy trein síðani á pallin. Hesin bólkur hevur spælt saman síðani 2004 og hevur ein fittan fjepparaskara eftirhondini. Nakrir av teimum vóru tilstaðar fríggjakvøldið og headbangaðu óført við, meðan Synarchy rokkaðu tungt og hart við nógvari orku. Bólkurin virkar væl samanspældur og hevur tamarhald á larminum, hann spýtir út.

Sum heild ein fín framførsla frá Synarchy, sum tó eisini mundi brostið oyrini út hjá mær, tí eg sat heilt frammi móti pallinum at byrja við, inntil eg flutti meg longur aftur.

### Bendar Spónir endaðu

Síðsti bólkurin á pallin fríggjakvøldið hevur heldur syrutta navnið Bendar Spónir. Fýra mans eru í bólkinum, ið spælir instrumentalan, tripputan rokk. Hoyrdi hendan bólkin tilvildarliga einaferð, teir vandu uppi á Margarinfabrikkini, og helt, at teir ljóðaðu áhugaverdir og øðrvísi, so eg gleddi meg at hoyra teir aftur. Metti tað eisini vera eina fína framførslu fríggjakvøldið við heilt góðum løtum.

Bólkurin jammaði yvir nakrar fáar, einfaldar akkordir, og tað gekk eitt rættiliga týðiligur tráður aftur til 70'ara Pink Floyd. Eri nokso vísur í, at teir hava hoyrt klassikaran »Dark Side Of The Moon«, ið hevur ein heilt serligan stemning yvir sær. Koyrt verður nógv uppá hetta við at skapa eina atmosferu yvir langar passasjur, við glíðandi yvirgangum yvir í nýggj pettir. Og tað ljóðaði gott hjá fýrunum! Avgjørt ein spennandi bólkur, sum verður spennandi at hoyra meira til framyvir.

### Tónleikurin í hásæti

Serliga The Story Ends, Uni Debess og Bendar Spónir vóru eftir mínum tykki mest spennandi bólkarnir, meðan Synarchy avgjørt eisini hava nógv gott í sær. Aftaná konsertina vóru oyrini troytt. Sum sagt, ljóðið kundi verið betur og til tíðir eitt sindur spakuligari, og kanska fyriskiparar av konsertum á Margarinfabrikkini áttu at havt longri ljóðroyndir. Men burtursæð frá ljóðinum, var konsertin væleydnað, við nógvum áhoyrarum og vælupplagdum bólkum. Vónandi verður Margarinfabrikkin skjótt karmur um fleiri konsertir við nýggjum, óroyndum bólkum/einstaklingum og eisini teim meira etableraðu, tí tað er umráðandi, at støð eru at spæla, har bert tónleikurin er í hásæti. Hetta kann Margarinfabrikkin, hóast ikki optimal, leggja høli til.



*Mong vóru samlað í Margarinfabrikkini til rokk konsert á Mentanarnáttini, og eina løtu var rættiliga fult har inni við ungum sum eldri áhoyrarum.*
*Mynd: Beinta Haraldsen*